# Deyðans dystur í Kiev

**Tvær ferðir í 1942 noktaðu Dynamo Kiev leikarar at lýða nazistisk harraboð. Teir fingu boð um at tapa, men vunnu 5-1 og 5-3 á úrvalsliðnum hjá týska flogvápninum; Luftwaffe. Tað fekk ræðuligar fylgjir**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein heitan summardag í Nazi-hertikna Ukreina, í Kiev, tann 9. august í 1942 tóku tvey fótbóltslið støðu á vøllinum fyri at gera klárt til ein ógvuliga serstakan dyst. Annað liðið á vøllinum var “Flakelf”, sum var eitt lið, sum var samansett av teimum bestu fótbóltsleikarunum hjá týska flogvápninum; Luftwaffe. Mótstøðuliðið hjá teimum hendan dagin var “FC Start”, sum var sett saman av upprunaligum Dynamo Kiev leikarum. Teir ukreinsku fótbóltsleikarnir arbeiddu á einum bakaríið undir nazistisku hersetingini. Dysturin bleiv kunngjørdur í bløðunum, í útvarpinum, og á plakatum runt alt Kiev-økið. Liðini høvdu leikt einaferð áður. Tá vann FC Start so klárt sum 5-1 Hetta skuldi ikki endurtakast! Hesuferð skuldi týska harrafólkið so ikki lúta fyri ukreinsku “undirmenniskjunum”.

## Áðrenn dystin

Áðrenn dystin møtti ein SS-offiserur upp í umklæðingarrúminum hjá FC Start, og segði á fullkomnum russiskum: “Eg verið dómari í dag! Tit hava at fylgja reglunum. Gerið so væl, og ikki at bróta nakrar leikreglur. Og áðrenn dystin: heilsi mótstøðumonnunum á teirra hátt!”. Týskarnir væntaðu sjálvsagt, at ukreinsku leikarnir fóru at heilsa Flakelf við Hitler-heilsanini.




Og at teir í FC Start vóru nóg klókir til at tapa dystin við vilja. Tá liðini tóku støðu á vøllinum brølaðu Flakelf-leikarnir: “Heil Hitler” ímóti áskoðarafjøldini, og blivu heilsaðir aftur av teimum týsku áskoðarunum! Men FC Start leikarnir valdu at gera eina aðra heilsan. Teir hildu hendurnar fyri bróstið, og róptu sovjetisku heilsanina: “FizcultHura” – sovjetiska heilsanin fyri tað likamligu venjingina. Teir mongu ukreinsku áskoðarnir fagnaðu teimum stórliga.

## 1. hálvleikur

Dysturin fór í gongd. SS-dómarin loyvdi Flakelf at gera sera grovar og ólógligar taklingar, har eingin bóltur lá ímillum. Flakelf obstruk-teraðu Start-málverjan á ólógligan hátt, og løgdu seg á odda 1-0. Dómarin segði seg einki síggja til tilburðin. Men Start fall ikki í fátt. Tá dómarin loksins kendi seg noyddan at døma fyrsta frísparkið til Start í dystinum, setti Kuzmenko hetta frísparkið í málið til javnleik 1-1. Goncharenko fintaði síðani alla Flakelf-verjuna og skoraði trygt til 2-1 til Start, og beint áðrenn hálvleik skoraði Start til 3-1. Ukreinska áskoðarafjøldin var í ekstasu.

## Aftur vitjan

Í hálvleikinum fingu Start-leikarnir aftur vitjan í umklæðingarrúminum. Fyrsti maður á gátt var ein lokalur samstarvsmaður hjá nazistunum, ið nevndist Shvetsov, sum ráddi teimum til at tapa við vilja, um teir vildu sítt egna besta. Seinni gesturin – ein annar SS-offiserur – var meiri týðiligur í síni fráboðan. Hann segði Start-leikarunum, at tað fór at fáa ræðuligar fylgjur, um teir ikki taptu dystin við vilja. Men FC Start vildi ikki geva eftir fyri harraboðunum. Teir høvdu eina risastóra fjøld av ukreinskum áskoðarum aftanfyri seg, og teir á Flakelf kendu trýstið frá áskoðarunum. Flakelf tordi ikki so væl at gera tær somu svínsku taklingarnar í 2. hálvleiki. 2. hálvleikur var rættuliga javnur, og bæði liðini skoraðu tvey mál í part. So munurin var hin sami, sum við steðgin. FC Start hevði vunnið 5-3 á úrvalsliðnum hjá Luftwaffe; Flakelf. Største eyðmýkingin fyri nazistarnar hendi við støðuna 5-3. Klimenko setti alla týsku verjuna av, rundaði týska málverjan, og beint áðrenn hann skuldi seta bóltin í málið til 6-3 hælaði hann bóltin út frá málstrikuni aftur. Ariska meistara-rasan hevði tapt greitt ímóti ukreinsku “undirmenniskjunum”, enn einaferð!

## Hevndin

Hevndin hjá nazistunum kom. Men ikki so skjótt aftaná dystin, sum tær sovjetisku søgubøkurnar hava skrivað. Sambært sovjetisku søgubókunum blivu allir Start-leikarnir tiknir til Babi Yar-fangaleguna, og har vóru teir skotnir, ílætnir sínum fótbóltsbúnum. Men hetta er so ikki rætt! Men longu 16. august møtti

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



Almannastovan
søkir starvsfólk

Leiðari til Veitingardeildina

Nú leiðarin á Veitingardeildini hevur fingið aðrar avbjóðingar á Almannastovuni, søkja vit eftir einum nýggjum leiðara til Veitingardeildina.
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi, avbjóðandi og sera fjølbroytt starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har tú verður við í framhaldandi menningini av Almannastovuni og hevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Sum leiðari á Veitingardeildini hevur tú ábyrgdina av øllum veitingum innan fólkapensjón, fyritíðarpensjón, sjúkradagpening, barnagjald, stuðul til uppihaldspening o.a.
Harumframt hevur tú ábyrgdina av menningini av øllum starvsfólkunum á deildini.

Les meir um starvið á www.almannastovan.fo

Samskipari innan leiðslu og kunning

Søkt verður eftir samskipara innan leiðslu og kunning til stjóraskrivstovuna á Almannastovuni at byrja skjótast til ber.
Á Stjóraskrivstovuni eru tveir samskiparar, ið arbeiða tætt saman. Okkara ynski er, at tú hevur politiskt og fyriskipanarligt tev, og ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávur í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið er skipað við beinleiðis tilvísing til stjóran, og samskiparin er, saman við hinum samskiparanum, við til at skipa arbeiðið.

Les meir um starvið á www.almannastovan.fo

ENDURLÝSING
Starvsfólkaleiðari

Almannastovan er stovnur í støðugari menning og sum alla tíðina skal laga seg til krøv frá tí politiska myndugleikanum og samfelagnum annars.
Endamálið er, at viðskiftafólk okkara til eina og hvørja tíð skulu kenna seg væl og fáa eina professionella tænastu. Skulu vit røkka tí málinum, er neyðugt, at vit hava starvsfólk, sum eru útbúgvingarliga væl fyri og eisini trívast í gerandisdegnum. Okkum tørvar eitt fólk, sum burturav kann taka sær av hesi uppgávu.

Les meir um starvið á www.almannastovan.fo

ENDURLÝSING
KT-starvsfólk til Vitanardeildina

Í sambandi við at Almannastovan í næstum fer undir ta størstu almennu KT-verkætlanina nakrantíð í Føroyum, verður søkt eftir KT-starvsfólki til Vitanardeildina á Almannastovuni. Til fyrra part av KT-verkætlanini - ið væntandi fer at fevna yvir tvey ár - eru játtaðar 15 milliónir krónur. Eftir ætlan verður farið undir seinna part í 2009/2010, ið somuleiðis væntast at fevna yvir tvey ár.
Sum KT-starvsfólk verður tú partur av einum KT-bólki, sum komandi tíðina kemur at arbeiða við kravfesting, prosessoptimering, design o.ø. Umframt hetta kemur tú at taka lut í øðrum uppgávum á Vitanardeildini.

Les meir um starvið á www.almannastovan.fo

*Umsóknir til øll størvini við CV, avriti av prógvum v.m. skulu vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 26. oktober 2007 kl. 12.00.*

*Send umsóknina til:*

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn

KREA.FO